# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Tað eru bretar, sum eru komnir til Zimbabwe við kolera-smittuni. Hetta er lívfrøðilig krígsførsla*

*zimbabwiskur ráðharri*

# Andstøðuleiðari til valdið í Teilandi

**Teilendska tjóðartingið valdi í morgun andstøðuleiðaran Abhisit Vejjajiva til forsætisráðharra**

Fyri at vinna valið skuldi Abhisit Abhisit fáa stuðul frá minst 219 tinglimum, og tá upteljingin var liðug, hevði hann fingið 235. Hitt valevnið, løgregluovastin Pracha Promnok, fekk 197 atkvøður.

Tjóðartingið noyddist at velja nýggjan stjórnarleiðara, eftir at grundlógardómstólurin herfyri kunngjørdi, at táverandi forsætisráðharrin, Somchai Wongsawat, og fleiri av hansara næstu monnum vóru sekir í sviki og tí ikki kunnu taka lut í politiskum virksemi tey næstu fimm árini.. Tað gjørdi, at Somchai mátti leggja frá sær, og samstundis bleiv flokkur hansara, PPP, upploystur.



*Abhisit Abhisit er nú teilendskur forsætisráðharri*

*Mynd: Polfoto*

Tað var stórur spenningur upp undir atkvøðugreiðsluna í tjóðartinginum í morgun, og tað er ein spurningur, um úrslitið fer at gera enda á ófriðinum, sum hevur verið í Teilandi í heyst. Tíðindafólk vísa á, at umleið 200 fólk vóru komin saman uttan fyri tinghúsið í morgun fyri at forða tingmonnum at sleppa inn. Tey róptu rakstrarróp eftir Abhisit og vildu vera við, at hann er í lummanum hjá herleiðsluni.

Nýggi teilendski forsætisráðharrin er føddur í Bretlandi og hevur útbúgving frá lærda háskúlanum í Oxford. Hann er 44 ára gamal.

## Hørð revsing fyri at royna at flýggja úr Norðurkorea

**Í Norðurkorea hava myndugleikarnior hert revsingina til teirra, sum royna at flýggja av landinum**

Tey seinastu árini hava fleiri milliónir norðurkoreanar roynt at flýggja undan hungri og politiskari kúgan, men myndugleikarnir eru avmarkaðir.

Markið ímóti Suðurkorea er so væl vart, at tað er at kalla vónleyst at sleppa ósæddur um tað. Tí velja tey flestu at royna at sleppa yvir um Gulu Ánna, sum er mark ímóti Kina, og haðani til okkurt annað land. Men tað er heldur ikki lætt, tí Kina hevur styrkt vaktarhaldið við síni landamørk, og teir norðurkoreanar, sum eru so hepnir at sleppa yvir um ánna, verða sendir yviraftur.

Norðurkoreanar revsa síni egnu flóttafólk hart, og sambært tíðindastovunum er revsingin herd nú. Sagt verður, at fólk fáa frúgva fongsulsrevsing, meðan onnur enda í arbeiðslegum.

Men neyðin er so stór, at fleiri velja kortini at royna at sleppa burtur, skrivar Reuters.

## Veturin kom við kulda og regni



*Vetrarveðrið hevur verið sera ymiskt teir seinastu dagarnar. Í landnyrðingspartinum av USA hava fleiri túsund hús mist streymin, tí klaki er lagstur á teir elektrisku træðrirnar, so teir eru slitnaðir. Í Eysturríki hava vegamyndugleikarnir úr at gera við at halda vegirnar opnar, tí tað kavar so illa. Har suðuri í Fraklandi og í Italia er áarføri av grimdarregni, soleiðis sum hendan myndin av Tiber-ánni í Rom vísir*

*Mynd: Polfoto*

**STUTT SAGT**

### Eldur elvir til illgruna



*Eldurinh kom í kirkjuna hjá Sarah Palin*

*Mynd: AP*

Fríggjadagin kom eldur í kirkjuna Wasilla Bible Church í býnum Wasilla í amerikanska statinum Alaska. Mansskaði var eingin, men kirkjan fekk rættiliga stóran skaða.

Sløkkiliðið í Wasilla sigur eldin vera heldur illgrunasaman, og sambært sløkkileiðaranum, James Steele, at tað er ikki óhugsandi, at eldurin er ásettur.

Tað, sum hevur vakt ans, er, at republikanska varaforsetavalevnið Sarah Palin gongur vanliga í kirkju í Wasilla Bible Church. Leygardagin var Sarah Palin í kirkjuni og bað prestin um umbering, um tað skuldi víst seg, at eldurin hevður nakað við hennara uppstilling at gera.

### Ríkmaður mist nógvar milliardir

Saudiarabiski prinsurin Alwaleed bin Talal , sum sigst vera tann ríkasti arabarin í heiminum, hevur sambært blaðnum Arabian Business mist umleið fýra milliardir dollarar í ár orsakað av fallandi virðisbrøvum og altjóða fíggjarkreppuni.

Men hóast tann ovurstóra missin er bin Talal framvegis tann ríkasti arabarin. Arabian Business, sum kemur út í Dubai, skrivar, at prinsurin eigur góðar 17 milliardir dollarar eftir.

Saudiarabiski prinsurin eigur millum annað nógv partabrøv í bankanum Citigroup, og hann verður javnan umrøddur sum tann arabiski Warren Buffet.